Fylgiskjal 45

dugni

Dugni
Á Hjalla 7A >> Postsmoga 301
FO-110 Tórshavn >> Faroe Islands
Telefon: 35 00 70 >> Telefax: 35 00 71
dugni@dugni.fo >> www.dugni.fo

Til Almannamálaráðið

á Hjalla 16.01.2020

**Hoyringssvar til uppskot til Løgtingslóg um almannatrygd og vælferð. (Vælferðarlógin)**

Eg skilji at freistin at lata inn viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð til hoyringar er í morgin. Vegna Dugna havi eg hesar viðmerkingar:

**Vísandi til viðmerkingar til § 61** stendur: Almannaverkið tekur avgerð sambært hesi løgtingslóg, tó kunnu sjálvsognarstovnar, ið reka virksemi, ið er skipað við heimild í hesi løgtingslóg taka avgerð um upptøku, og nær fyriskipan endar.
Fyri virksemi hjá Dugna, hevur tað stóran týdning, at stovnurin heldur fram sum nú, sum ein sjálvstøðugur stovnur, ið tekur avgerð um upptøku, og nær fyriskipan endar.

**Vísandi til viðmerkingar til § 66** stendur: at Dugni saman við øðrum sjálvsognarstovnum skal fáa játtan til rakstur umvegis játtanina hjá Almannaverkinum. Tað er umráðandi fyri virksemi á Dugna, at stovnurin framhaldandi fær sína játtan á fíggjarlógini sum nú. Hetta merkir at stovnurin fær sína játtan beinleiðis á fíggjarlógini og ikki umvegis Almannaverki.

**Vísandi til viðmerkingar til § 69**: Dugni tekur undir við, at landsstýrismaðurin hevur eftirlit við stovninum.

Dugni ger einans viðmerkingar til tær greinarnar, ið viðkoma stovninum, og er okkara virksemi tengt at, at vit kunnu halda fram sum nú. Vit virðismeta samskifti og samstarv við landsstýriskvinnuna og fyrisitingina í Almannamálaráðnum, og síggja vit fram til eitt framhaldandi gott samstarv til frama fyri okkara viðskiftafólk.

v/ Hedvig Johansdóttir, stjóri

styrkir tínar arbeiðsførleikar